# Dagbóksbrot úr eini hospitalssong á B6



*Fái eina dundurtalu frá læknanum, sum er á stovugongd, stovugongdin, sum absolutt er hæddarpunktið á degnum á B6. Hann minnir meg á mína ábyrgd fyri heilsuni og harvið eisini fyri samfelagnum. Høvdu vit verið meira tilvitað um okkara heilsu, hoyrdu vit ongantíð eitt graml aftur um fíggjartrupulleikar innan heilsuverkið og fyri tann saks skuld á B6*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Fyrri partur**

*Eftir Jústinus Leivsson Eidesgaard*

**Fríggjadagin 11. januar 2002:**
Í morgun varð frælsið knappliga tikið frá mær, so knappliga, at eg valla varnaðist tað sjálvur fyrrenn løtu eftir at tað var hent. Var hjá kommunulækna í sambandi við ov søtt blóð í morgun um níggju tíðina og stóð løtu seinni úti í túninum í fríska útsynninginum við einum innleggingarseðli í hondini.

Eitt sindur paff. Korthúsið rapladi fyri framman. Hevði glett meg til vikuskiftið, har absolutt einki skuldi henda. Hevði í huganum fyrireikað arbeiðsdagin á blaðnum og hann sá spennandi út.

Einki er sum fríggjadagur eftir eina góða viku hjá einum journalisti. Einki er sum fríggjadagur yvirhøvur. Øll eru so løtt í huga. Troytt og løtt og fjákut, sum ovfarakát børn seint á kvøldi.

Og so minnir innleggingarseðilin meg á at gloyma alt um fríggjadagsstemmning, gera skjótt av, fara heim eftir tí neyðugasta og síðan halda leiðina út á hospitalið.

Eg endaði á B6. Hendan deild, sum eg so mangan havi vent og snarað á redaktiónsfundum á Sosialinum og á forsíðuni eisini. Nú var hon ikki longur eitt spennandi mál, sum skuldi handfarast eftir bestu sannføring blaðsins. Nú var eg undirlagdur hesa deild. Nú var frælsið tikið frá mær, og eg var umgyrdur av blídligum og sera dugnaligum starvsfólki, sum hevði so nógv betri skil á mínum likami enn eg sjálvur.

Alt hendi so knappliga, at eg gloymdi helvtina eftir av tí, eg skuldi hava við. Inniskógvarnir og heita opna innitroyggjan lógu eftir á blaðnum. Her trekkir so vælsignað við vindeygað inni á stovuni, her eg siti, og eg komi at hugsa um fjálgu troyggjuna á míni skrivstovu, sum eg fekk soleiðis, eg veit ikki rættuliga hvussu, á Sjómanskirkjuni í Hamborg, har eg starvaðist. Hon hekk bara har í garderobuni í gongini fyrsta hálva árið og eg hugsaði, at onkur mundu hava gloymt hana eftir. Ongin gav henni gætur. Hon bleiv hangandi og eg fór varisliga at ganga í henni av og á. Ongin setti krøv fram móti troyggjuni, ið er úr fínastu hetlendskari ull. Nú er hon mín og hevur fløvað mangan vetrarmorgun, áðrenn eg rættuliga eri komin í gongd og gangi hvíttklæddur í húsinum.

Klokkan er 10 á kvøldi. Stovufelagin, ein eldri maður úr Gøtu, svevur søtan. Friður liggur yvir andlitinum og av og á fyllir hann lunguni, meðan hann andar djúpan, onkuntíð steðgar hann heilt góða løtu og eg óttist at hann heilt hevur gloymt at anda í fasta svøvninum.

Uttan fyri er klárt og myrkt. Ljósið av argjalandinum litar aldurnar á sandinum í Sandagerði. Soleiðis havi eg ikki sæð tær fyrr. Aldurnar kela tí blanka sandinum, ið glitrar í veika ljósinum eins og hvøljan á nýdeyðari grind.

Og prestagarðurin er myrkur. Tað er ikki meira enn tú hómar ljós. Hvar munnu tey vera í kvøld?

Vistu tit, at heilir sjey skorsteinar eru á gamla hospitalinum, á Dronning Alexandrines Hospital, sum eg síggi beint niður á her av B6. Teir standa har til onga verðsins nyttu og eru ein leivd av farnum døgum. Omanfyri vegin stendur tann stóri skorsteinurin, sum hevur avloyst allar hesar gomlu. Hann er errin í kvøld og stendur fattur, kølgráur og svartur og blunkar niður á hinar, ið neyvan hava kent fløva tað livandi menn minnast.

Áh Gud! sum her er friðarligt. Órógvin byrjar at gera um seg inni í mær. Nú eru 10 tímar síðan eg chekkaði mail seinast. Eg havi lisið 60 síður av skaldsøguni “Kongens Fald” eftir Johs. V. Jensen, ein tann besta danska skaldsøgan yvirhøvur. Eg havi útgreinað øll hugsandi ættarbond við stovufelagan, við tí úrsliti at vit als ikki eru í familju. Konan og annar sonurin hava verið og vitjað, nátturin er etin, kvøldardrekka við, og stovufelagin smásnorkar. Men sjálvur kenni eg ongan friðin enn og her hendir ikki meira.

**Leygardagur 12. januar 2002:**
Morgun, og skrambul av stálvagnum og tallerkum hoyrast á gongini uttanfyri. Næstan í svøvni hoyri eg málið á morgunfrískum og væluppløgdum sjúkrasystrum og røktarum. Klokkan er átta og tey hava longu verið leingi uppi. Tað er so óendiliga nógv, sum skal fáast frá hondini hendan fyrsta tíman á einum sjúkrahúsi, áðrenn morgunmaturin verður serveraður.

Eg svari linliga spurningum, eri ikki morgunmaður og gerist eitt sindur ilskur innan, haldi mær høfligur og beherskaður og geri sum sagt verður. Taki blóðsukur, blóðtrýst og hiti verða máld.

Gangi ein túr eftir gongini. Tað sær út til at øll eru komin undan náttini á lívi og sterku slímharkini úr eini fjarari stovu, ið saman við øgiligum hostianføllum, hava klovið tøgnina í nátt, eru avtakandi.

Fram móti middegi kenni eg døgurðaroyk. Ein vælkendur luktur, angin av royktum medistara, sum er ein av mínum lívrættum. Vónbrotið er stórt, tá eg komið inn í uppihaldsstovuna. Meðan hini sita og gottað sær við royktum medistara, sær tunnligt út á mínum tallerki. Nøkur veikgul eplir, nakrir malnir kjøtbitar og knallreytt reyðkál, og liturin svarar slett ikki til smakkin. Eg eti, hugsi meira um mettuna enn um smakkin og síggi tann beiska veruleika dansa framman fyri mær: “Nú skal tú taka annað skinn um bak, hin gamli. Nú skal ansast eftir matinum, skal tú náa tí høgt eftirtraktaða aldurdóminum, sum ongin rósar og sum er rein elendigheit, skulu vit trúgva pensiónistunum.

Uttan fyri er áarføri. Sandá hevur ført nógva mold oman í morgun og ósin er morreyður úti við argjalandinum, heilt út móti Høvdanum. Hann er landsynningur og ikki er sami friðurin í dag yvir vánni, sum í nátt, tá sandurin lá sléttur og nýkemdur.

Og nú er nátt, ein still nátt, regnið klikkir spakuliga á vindeygað uttanfyri, her er friðarligt, sjónvarpið gongur enn. Náttarvaktirnar eru farnar til verka. Tær ganga stillisliga og teska, og náttin rurar friðin niður yvir B6.

**Sunnudagur 13. januar 2002:**
Vit eru tríggir á stovuni nú. Ein kvívíkingur kom í gjár og vit kendust. Eg gjørdi honum dyggiliga órætt í nátt. Var júst komin í tyngd og vaknaði av eini snorkan, sum segði spar tvey til alt eg higartil havi hoyrt. Luftin í stovuni sitraði, tá hann andaði inn, og hon gav seg í sárum eymki, tá hann blásti út. Hugsaði um at ringja eftir náttarvaktini fyri at fáa hana at sissa hendan vitleysa gangin. Sendi eina panikkbøn upp eftir til Várharra, og bað hann um, at eg ikki skuldi ilskast inn á sovandi mannin, sum var ósekur og slett einki kundi gera við, at hann svav so larmandi.

Bønin hjálpti. Eg vendi mær móti snorkandi manninum og hann sigur við meg: “Hetta er rekordin, slíkt snork havi aldrin hoyrt áður”. Tá var tað tann triði stovufelagin, sum hevði leverað gangin. Hann vaknaði nú eisini, í einum av hesum óhugnaligu andingarpausunum, tá tað sær út sum tann snorkandi gloymir at anda og liggur sum deyður eina løtu. Vit løgdust at práta og tá eg vaknaði aftur um morgunin, var eg helst tann einasti, sum hevði sovið alla náttina á stovuni, eg veit ikki hví.

Í ávísum støðum her á B6 eiti eg bara 8.3 og stovufelagarnir hjá mær ávikavist 8.2 og 8.1. Fyri at skilja hetta betur, so kann eg siga tykkum, at 8.3 liggur uttast við vindeygað og 8.1 liggur innast, 8.2 liggur onkunstaðni mitt í millum. 8.3 fekk gullash til døgurða í dag og ymerdessert omaná. Ein sera vælsmakkandi døgurði. Sósin, reyð á liti, var lættliga kryddað við pipari, ið gav ein eftirsmakk sum av eini góðari nýgjørdari rullupylsu. Eg steðgaði eina løtu, áðrenn eg fór undir dessertina og nýtti rákan av góða døgurðanum.

Eg havi nógv at takka fyri, at heilsan er í lagi, ella soleiðis á einari leið. Hetta verði eg mintur á, nú eg eri á sjúkrahúsi millum sjúklingar sum sjúklingur. Yvir av mær, við døgurðaborðið í dag, sat ein eldri maður, ið er ættaður úr eini bygd norðarlaga á Streymoynni. Hann sá sjúkur út og tað øvugta av matarlysti lýsti úr andliti hans. Hann var eitt sindur lammaður og stýrdi ikki høgru hond rættuliga. Hann sat og noyddi onkran bita niður í seg. Ofta datt tað, hann hevði fingið upp á gaffilin, niður aftur. Hann hugdi upp á meg uppgevandi og legði frá sær. Eg sat hjálparleysur. Tað gekk ikki long tíð, so var eitt av røktarfólkunum hjá honum og eggjaði honum at halda fram. Hann royndi mannliga og fekk nakað niðurum. Hann sannaði vísdómsorðini hjá skálamanninum, ið eftir eitt drúgt tørn, tá hann endiliga fekk matarlystin aftur, mælti: “Hvis tú ikki etur sær tú, so doyr tú sær tú!”

Ein annar maður fekk nakað seinni blóð. Ein klænur, grádæmdur maður norðan úr Sundalagnum. Eitt tól við lívsjáttandi navninum “Life Care Pump” doseraði spakuliga blóðið inn í æðrar mansins og eg helt, at sjónliga sást munur, hann fekk dæmið aftur. Meðan hann hyggur undrandi upp á meg sigur hann: “Eg skilji væl, sum nú, at fremmanda blóðið rennir inn í æðrarnar, men eg skilji ikki hvar tað blívur av, tá tað minkar aftur eftir nøkrum vikum.” Sjálvur hevði eg onga forkláring upp á hendan, fyri hann, viðkomandi spurningin.

Eg hugsaði: “Hetta verður kanska einaferð eg,” meðan eg hugdi eftir hálvtóma blóðposanum, sum hekk reyður uppi á einum stativi. Í tí løtu avgjørdi eg, at eg vildi melda meg til sum blóðgeva. Klokkan var 16:30, 13. januar 2002.

Ongin kom at vitja meg seinnapartin í dag og pínadoyð sum eg gerist ilskur inn á tey vitjandi, tá eg sjálvur onga vitjan fái. Og so fara tey heldur ikki avstað aftur. Verða sitandi, meira at kalla hangandi, siga somu setningarnar umaftur og umaftur, eru so fylt av samkenslu, at eg eri um at sálast. Og tú sleppur ikki undan teimum. Flýggjar tú úr stovuni, so sita tey eisini á uppihaldsstovuni. Nú er klokkan farin av fimm og ein heilur tími er farin út um vanligu vitjunnartíðina og tey eru her framvegis. Eg eri troyttur, linur og ynski frið, antin til at lesa ella sova, men fái ikki savnað tankarnar, tí endurtøkurnar frá teim vitjandi órógva støðugt.

Út aftur í uppihaldsstovuna. Har er eisini fult av vitjandi. Hugsi hví tey ikki bara leggja seg inn permanent, tað er minni munurin hvør er meira á sjúkrahúsinum, tann sjúki ella avvarðandi. Gudstænasta er í sjónvarpinum. Eg skrúvi demonstrativt sjónvarpið so hart, at tað doyvir gangin og endurtøkurnar, og eg hoyri dómpróstin doypa borgara nummar 18.000 í Havn. Og tá hann saman við børnunum í kirkjuni biður bønina sum, Jesus lærdi okkum, Faðir Vár...., tá blotnar mítt hjarta, aggið móti teim vitjandi hvørvur, og eg minnist orðini hjá einum vinmanni til mín einaferð: “Jústinus, tá tú sær fleiri enn tvey beist ein dag, so er stundin komin at hyggja inn í teg sjálvan.”

**Mánadagur 14. januar 2002:**
Mánadagurin kom spakuliga. Tað var eins og náttin ikki rættuliga vildi sleppa honum framat. Náttin lá myrk yvir landið og run var í sjónum. Sandurin í Sandágerði var hvítur av skúmi, sjóvarilska og brim. Javnan sást tú tvey brot í senn. Lygnið er fram við argjalandinum og í ósanum. Óendaliga vakur er hesin sandur, sum hevjar seg í eina lága brekku niðan frá sjóvarmálanum.

Nú leika børn á sandinum, tvey børn og ein lítil hundur, ein puddil, tey renna undan aldunum. Tey endurtaka ein leik, sum hevur verið til síðan menniskjan reisti seg upp á afturbeinini einaferð í tíðarinnar morgni. Litspælið á sandinum skiftir allatíðina. Tey størstu brotini lita sandin snjóhvítan, tá hann andar inn, og sjógvurin skiftir yvir í tað gráa, tá havið dregur sítt aftur til sín. Fossurin í Sandá smæðist heldur ikki burtur í morgun. Tað hevur regnað í nátt og hann er gulligur á at líta í morgun. Úti í bátahylinum liggur milliónaflotin hjá argjamonnum. Tilriggarar hómast niðri á havnarlagnum. Býurin vaknar svøvntungur í hundasjúku og vanligari stúran fyri vikuni fyri framman, fyri verðsligari neringsorg nú í januar, nú tey seinastu jólatrøini enn ikki eru fyribeind.

Og her á B6 steðgar alt so spakuliga upp hjá sjúklingi nummar 8.3. Tølini, sum skramblaðu niður fyrstu tímarnar á hospitalunum, eru steðgað á, her gongur spakuliga og eg gerist mótfallin.

Og so fái eg eina dundurtalu frá læknanum, sum er á stovugongd, stovugongdin, sum absolutt er hæddarpunktið á degnum á B6. Hann minnir meg á mína ábyrgd fyri heilsuni og harvið eisini fyri samfelagnum, at spara samfelagnum fyri pening, tí eg upptaki eina dýra hospitalsong, hugsi eg við mær sjálvum. Eg fái boð um at renna og nú síggi eg, at eg kann gera mær sjálvum eina tænastu heilsuliga við at renna og eg kann stuðla samfelagnum. Við at halda meg burtur frá sjúkrahúsinum, renni eg. Tað eru tað faktisk nógv sum kunnu, tí nógv liggja inni fyri misrøkt av heilsuni í reinum vællevnaði, fyri at hava etið, roykt ella drukkið seg hálvt í hel. Høvdu vit verið meira tilvitað um okkara heilsu, so hoyrdu vit ongantíð eitt graml aftur um fíggjartrupulleikar innan heilsuverkið og fyri tann saks skuld á B6. Hvør songin kostar 4000 krónur um dagin og eg rokni leysliga: “Síðan fríggjadagin havi eg ligið samfelagnum til last fyri heilar 16.000 krónur. Og so smílist skálkurin inni í mær: “Nú fái eg endiliga nakað afturfyri knøppu helvtina, sum eg latið í skatti trúliga hvønn mánað.”

Rætt hevur læknin. Eg síggi meg sjálvan fyri mær við pannubandi, í joggingklæðum og í Nike skóm rennandi eftir Hvítanesvegnum, í paniskari deyðsangist, undan tí deyða, sum eg ikki sleppi undan, men tað er mín ábyrgd at útseta hendan deyðsfund so nógv sum gjørligt.

Og nú drillar aftur ein tanki meg, og eg felli í sanna djúphugsan, eitt sindur ørkymlaður. Áttu læknarnir ikki at verið fyrimynd fyri okkum, sum hava misrøkt okkara likam soleiðis, at vit eru endað á hospitali. Og nú kemur nakað, sum eg faktisk slett ikki tori at skriva. Hesar dagarnar, eg havi ligið á sjúkrahúsi, havi eg lagt til merkis, at tað er bara hendinga lækni, sum ikki er ov feitur. Bróðurparturin av læknunum eru plágaðir av stórum búki, og avleiðingin av hesum er sambært teirra egnu orð, ov høgt blóðtrýst, overvað hjarta og ov høgt kolestorol. Skal eg taka læknarnar alvorliga ella? Eg meini so við, at beita meg til kostráðgeva meðan fleskasteikin og sapparin bíða heima.

Deyðin hevur ikki vitjað, síðan eg kom á B6, men slitið av elli hittir tú allastaðni. Mannsævin er stutt, seks ferðir tíggju ár og eftir tað er likamið í stórligum forfalli, so stórum, at tú bæði sær og luktar tað. Og í eini ikki so fjarari framtíð, so eri eg kanska í somu støðu, men eg stúri ikki, tí friðurin, sum hvílir yvir andlitunum á hesum aldurstyngdu fólkum, er so stimbrandi, at har er einki at óttast. “Alt hevur sína tíð,” sigur Prædikarin í Gamla Testamenti og tey hava eisini átt sína tíð at dansa.